LM-082/2020

REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP
Shipowners of the Faroe Islands

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Fylgiskjal 2

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir

Tórshavn 21. oktober 2020

Att.:

Hoyringssvar til broytingaruppskot tonsaskattalógini

Víst verður til skriv sent okkum tann 24. september 2020, har uppskot til broytingar í tonsaskattalógini verður sent til hoyringar.

Reiðarafelgið fyri Handilsskip tekur undir við broytingaruppskotinum. Felagið metir, at neyðugt er hjá løgtinginum at gera hesar broytingar í tonsaskattalógini fyri at tryggja, at lógin virkar sum ætlað í samband við time-charter.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur í skrivi til Fíggjarmálaráðið gjørt vart við eina óhepna broyting um stutttíðar time-charter í tonsaskattalógini, sum løgtingið samtykti 4. juni 2020. Endamálið við broytingini um time-charter í grein 4 var at lata upp fyri møguleikanum, at stutttíðarleigað time-charter upp til 2 mánaðir eisini skulu koma undir treytirnar í tonsaskattalógini. Ætlanin varð ikki at broyta lógina soleiðis, at time-charter sum heild einans kundi verða upp til 2 mánaðir undir tonsaskattalógini. Reiðarafelagið fyri Handilsskip fegnast tí um, at henda rætting verður framd beinanvegin.

Tað er tó umráðani, at broytingin fær gildið frá og við roknskaparárinum 2019, eins og lógaruppskotið um tonsaskattalógina fyrr í ár gjørdi. Talan er í veruleikanum um eina óhepna misskiljing, og tí eigur hetta ikki at ávirka uppgerðarháttin hjá reiðarium fyri roknskaparárið 2019.

Vinarliga
Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Jórun Gardar